# Oljulóggáva á tingborð

Jan Müller

Eftir ætlanini skuldi Edmund Joensen, løgmaður leggja uppskotið til eina kolvetnislóg - oljulóg - fyri tingið í gjár. Í skrivandi løtu vita vit ikki, um framløga var á tingfundinum í gjár, men hon var so á skránni.

Jógvan I. Olsen, tingformaður segði við Sosialin fyrrapartin í gjár, at ætlanin var at fáa oljulóggávuna við í framløguna. Tað skulu so ganga tríggir dagar, til hon kemur til 1. viðgerð.

-Eg ætli so at seta hana á skránna til tingfundin fríggjadagin sigur tingformaðurin, sum leggur afturat at tað verður einki annað mál á skránni sama dag sum oljulóggávan er fyri.

Jógvan I. Olsen roknar ikki við at teir brúka meira enn henda eina dagin til viðgerðina, nú alt forarbeiðið er so væl úr hondum greitt. Eftir 1. viðgerð fer málið helst í Vinnunevndina ella møguliga eina víðkaða Vinnunevnd, har tað so skal vera í ein mánað.

Møguleiki er fyri at fáa málið aftur fyri tingið og samtykt fyri jól.

Arbeitt verður annars við at gera uppskot til skattalóg og treytir og reglur í sambandi við 1. útbjóðingarumfar. Fólk á Oljufyrisitinginí og í Oljuráðleggingarnevndini arbeiða við hesum. Sóleiðis sum Sosialurin skilur tað, er einki til hindurs fyri at hava hetta tilfarið klárt fyrst í komandi ári. Síðani skal tað leggjast fyri tingið og har hava eina politiska viðgerð.

Meðan tíðarætlanin fyri oljulóg og 1. útbjóðing tykist at fara at halda so nøkunlunda, so spøkir enn eitt mál. Talan er um ósemjuna um markið. Her liggur tað so í kortunum, at ein ella onnur avklárring skal koma í seinasta lagi hálvan januar. Men eftir øllum at døma stendur í botni í samráðingunum. Tað sær ikki mætari út, enn at báðir partar nú liggja og bíða eftir hvørjum øðrum. Bretar halda seg hava spælt væl út á fundinum seinasta summar, meðan føroyingar eftir øllum at døma ikki halda, at bretska útspælið er nóg mikið til, at glið kann koma á málið.

Sambært løgmanni í Sosialinum í gjár, so liggur avgerðin nú í hondunum á bretum.



*Hetta eru menninir, sum standa á odda fyri oljuútviklinginum í Føroyum. Frá høgru, Edmund Joensen, løgmaður, sum umsitur oljumál í Tinganesi, Herólvur Joensen, leiðari á Oljufyrisitinginí, Arne Poulsen, vinnumálastjóri og Martin Heinesen, leiðari á Jarðfrøðissavninum. Teir eru staddir uttan fyri grótbygningin, sum Mynd Jens K. Vang*


## Vit eru á bási nr. 14

*Vælkomin á bás nr. 14 og fá eitt gott tilboð uppá*

- Stereoanlegg
- Sjónvarp
- Parabol-plottarar/GPS
- Teldur

o.m.a.

**ELEKTRONIKBÚÐIN**
Vágur · Tlf. 73529

## OPEL COMBO




Kr. 99.000 við M.V.G.
– bíligari kann tað ikki verða

**OPEL**
Við Oyggjarvegin
P/f Meinhard Arge • Tlf. 16161